Góðan morgun kæru tit,

Eg takki fyri, at eg kann koma út á burðar- og barsilsdeildina at handa tykkum hesa lítlu gávu fyri at markera, at vit nú eru yvir 50.000 fólk í Føroyum.

"Vælkomið veri tú nýborna barn, so fegin vit heilsa tær",

"Vælkomið veri tú nýborna barn, tolin vit bíðaðu tær."

Soleiðis syngur M.C. Restorff í vakra sangi sínum, sum eitur kvøða til pinkubarnið.

Komandi foreldur bíða tolin eftir barninum, sum veksur í móðurlívi. 9 mánaðir kunnu tykjast long tíð. Men teir ganga skjótt, og brádliga er eitt nýtt lív borið í heim. Ein lítil útgáva av foreldrunum. Enn eitt undur, sum er so hjartaliga vælkomið. Og sum fullkomiliga broytir lívið hjá foreldrunum.

Burðar- og barsilsdeildin er av sonnum kjarnan í fólkavøkstrinum. Tí er tað fyri mær sjálvsagt at markera henda søguliga varða saman við tykkum. Her byrjar lívið hjá teimum flestu. Tit eru karmur um fyrstu kollveltandi tíðina hjá foreldrum og ikki minst nýføðinginum, sum kemur úr tryggu avbyrgdu leguni í móðurlívi. Og sum brádliga skal venja seg við síni foreldur, seg sjálvan, og lívið sum heild.

Nú eiga eg og kona mín tríggjar synir, tann yngsti er trý ár. Eg minnist enn, hvussu lívið uttanfyri Landssjúkrahúsið brádliga tóktist mær fullkomiliga óviðkomandi. Tá eg og kona mín húsaðust her við enn einum heitum nýbornum dreingjabarnið í favnum okkara.

Starvsfólkini her skoða lívsins undur hvønn dag. Tit eru fyrsta trygga reiðrið hjá nýføðingum og foreldrum. Tit arbeiða hvønn dag við at geva øllum eina so góðan byrjan upp á tilveruna sum gjørligt. Tað er her, at grundvøllurin undir samfelagnum verður lagdur. Tað eri eg tykkum ómetaliga takksamur fyri.

"Vælkomið veri tú nýborna barn, vit kenna at lívið lær." Soleiðis endar M.C. Restorff sín sang. Og við hesum orðum vil eg fegin handa tykkum hesa gávu fyri at markera,

at vit nú loksins eru yvir 50.000 fólk í Føroyum. Eg ynski burðar- og barsilsdeildini og øllum í Føroyum eitt stórt til lukku við hesum megnar felags avrikið.

Takk fyri.